ÍF-EB/S:

# ÍF vil uppaftur

**Skal sambandið við heiðursmerkjaplássini ikki missast, skal ÍF hava stig á borðið**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Eftir eina framúr byrjan upp á kappingarárið, hava tvey greið tap á rað sent ÍF nakað aftur í røðini á stigatalvuni, nú farið verður í holt við næsta triðingin av kappingini.

Tað er ein støða, sum tey í Fuglafirði ikki eru heilt so fegin um, og tó at eitt pláss í miðjuni avgjørt verður góðtikið, so siga spælaranrir seg vóna, at tað nú aftur skal bera til at klintra longur upp.

Til dystin móti EB/-Streymi hava fuglfirðingarnir aftur Bartal Eliasen við, eftir at hann var burturstaddur seinast, og tað fer helst at hava nakrar flytingar við sær. Seinast var Símun Eliasen vikarur í miðverjuni, men hann verður helst aftur á miðvøllinum sunnudagin.

Hinvegin er John Thomsen framvegis ikki klárur, og tí kann roknast við, at Rúni Elttør framvegis fer at hava pláss á bakkinum, um ikki Petur Simonsen finnur upp á nýggj ráð, so klaksvíkingurin aftur kann flyta upp á miðvøllin, har hann fyri tað mesta hevur verið í ár.

Hjá EB/Streymi er Egil í Bø einasti leikarin, sum ikki tykist verða tøkur. Hann hevur hesar báðar seinastu vikurnar havt armin í gipsi, men fríggjadagin skuldi hann so í røntgena. Tí er kanska møguleiki fyri, at gipsið verður skift um við okkurt léttari og bleytari tilfar, sum er loyvt á einum fótbóltsvølli, men talan verður tó neyvan um eitt pláss millum teir fyrstu ellivu kortini.

KÍ-TB:

# Nú skal KÍ standa royndina

**Við ella ikki. Tað tykist vera spurningurin, sum bæði TB og KÍ skulu svara sunnudagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*



*Á Sevmýri gjørdist talan um málleysan javnleik, tá Oddbjørn Joensen fyri fyrstu ferð stóð á odda fyri besta KÍ-liðnum*

Tað líkist einum intensum dysti í Klaksvík sunnudagin, tá KÍ tekur ímóti TB.

Flestum kunnugt, so hevur gongdin hjá KÍ verið alt annað enn nøktandi fyri klaksvíkingar í ár, men seinasta vikuskiftið var kanska snúningspunktið í so máta. Sigurin á ÍF gav í øllum førum nakað av luft, og skulu vónirnar um heiðursmerki hava lív lagað, so er neyðugt við trimum stigum afturat sunnudagin.

Og tað kann roknast við, at talan verður um sama fólkið, sum fer á vøllin hesaferð. Einasti spælarin, sum ikki var tøkur ta ferðina, varr Eyðun Klakstein, sum er úti við keiktum fótliði, og hann verður so ikki tøkur fyrstu vikurnar.

Hjá TB tykist støðan við fólki vera heilt góð. Boðini av Sevmýri eru, at Alexandar Jovevic nú eisini er um at koma fyri seg, eftir at hann hevur verið plágaður av vøddaskaðum, og so er spurningurin, hvussu Milan Milanovic finnur rúm fyri honum á miðvøllinum.

Og fyri Oddbjørn Joensen verður talan um endurtøku av styrkisroyndini, sum hann hevði í fyrstu uppgávu síni fyri KÍ. Tá spældu klaksvíkingar málleysan javnleik á Sevmýri, og tí eru útlitini fyri stigum kanska ikki heilt eingi sunnudagin.

HB-NSÍ:

# Mánadagsdystur í Havn

**Annan dagin á rað verður talan um toppdyst í Gundadali mánadagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Hava havnarfólk hug at síggja toppin av føroyskum fótbólti, so skuldu møguleikarnir fyri hesum verið góðir um vikuskiftið.

Sunnudagin eru tað liðini, sum í løtuni eru nummar eitt og fýra, sum fara at dystast, og mánadagin verða tað so tey, sum í løtuni eru á øðrum og triðja plássinum, sum skulu í eldin. Ein dystur, sum – alt eftir úrslitinum sunnudagin – kann bera eitt nýtt oddalið við sær.

### At kalla allir tøkir

Og báðir partar tykjast eisini hava allar mans tøkar til dystin. Venjingar stóðu tó á skránni bæði fríggjadagin og leygardagin, og tí kann sjávlandi nógv henda, men hóskvøldið vóru boðini í hvussu so er, at talan verður um sterkast møguligu uppstilling.

Einasti spælarin, sum ikki tykist vera klárur, er Kári Hansen hjá NSÍ. Hann hevur í ár drigist við skaða í knænum, og verður væntandi ikki tøkur fyrr enn um ein mánað ella har á leið.

Hinvegin hava runavíkingarnir aftur Gert Langgaard og Sjúrður Jacobsen at velja ímillum, og so er spurningurin, um Trygvi Mortensen finnur rúm fyri teimum á liðnum, sum hesar seinastu vikurnar hevur marsjerað við fullari ferð móti oddinum.

# Oddaliðini sett upp á pláss

**Brøndby fekk einki, FCK misti tvey stig í síðstu løtu, og nú er AaB rættuliga við í stríðnum um næstfínastu heiðurskrónurnar**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Hóskvøldið vóru øll tólv feløgini í superliguni í eldinum. Oddaliðið Brøndby legði á SAS arenuni í Herning rygg til 3-1 tap. Harvið fekk FCM hevnd yvir tapið móti Brøndby í steypafinaluni.

FCM venjarin, Erik Rasmussen, sum í síni tíð var sera snildur miðvallari í Brøndby, metti, at liðið hjá honum hevði víst besta avrikið í hesum kappingarárinum. Brøndby venjarin, Michael Laudrup, helt, at hansara lið í 1. hálvleiki hevði víst ússaligasta avrikið, síðani hann gjørdist venjari í Brøndby. Tað tóktist sum um, at spælararnir ikki høvdu fingið armarnar niður um høvdið aftur, eftir at teir sunnudagin vunnu 5-0 á FCK.

FCK hevði møguleikan at taka nakað av tí, sum teir sunnudagin mistu, aftur, men tað eydnaðist bara næstan. Teir høvdu vitjan av OB, sum javnaði til 1-1 stutt undan dystarenda. Zuma hevði í 1. hálvleiki lagt heimaliðið í Parkini á odda.

AaB er tað felagið, sum í vár hevur havt størstu úrtøkuna, og nú eru teir bara eitt stig aftanfyri FCK í kappingini um silvurkrónurnar. Eingin roknar við, at nakar verður førur fyri at fáa Brøndby aftur.

Hesa ferð var talan um sanna málveitslu, tá ið AaB hevði vitjan av grannunum úr Viborg. Í steðginum var heimaliðið á odda 4-0. Teir vunnu 5-3, men tá hevði støðan eina løtu í 2. hálvleiki verið 4-3!

Esbjerg hevur eisini víst støðug avrik í vár. Hesa ferð smurdu teir á heimavølli Silkeborg av 4-0.

Í Århus vann AGF 4-0 á Randers, sum sakk eitt sindur longri niður móti niðurflytingarplássi. Tað gjørdu teir, tí Herfølge á heimavølli og í vánaligari uppgerð vann 1-0 á FCN. Hesi bæði eru framvegis á niðurflytingar plássunum.

Sunnudagin verður spælt soleiðis: Viborg-Herfølge, Randers-FCK, FCN-AGF, OB-FCM, Silkeborg-AaB og Brøndby-Esbjerg.

# Schumacher harðliga taklaður

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Sjeyfaldi heimsmeistarin Michael Schumacher hevur vunnið í Monako fimm ferðir. Sunnudagin skal hann royna at vinna sættu ferð. Men spurningurin, ið fjølmiðlafólk og fjepparar spyrja, er, um Schumacher er 100% klárur. Sambært f1.com varð Schumacher harðliga taklaður av fyrrverandi franska liðskiparanum Didier Deschamps, tá teir spældu fótbólt fyrr í vikuni.

Michael Schumacher er fótbóltsleikari í frítíðini, og hevur fleiri ferð skipað fyri dystum fyri væl gerandi endamál. Hetta varð eisini gjørt fyrr í vikuni, tá eitt lið av fólki úr formel 1 heiminum spældi ímóti einum liðið av kendum, ið búgva í Monako.

Michael Schumacher er eitt sindur meislaður, men gleðir seg til at sleppa at koyra. Hann viðgongur, at koyringin verður trupul. Í Monako er sera torført at yvirhála, og smalu gøturnar loyva ongi mistøk. Tí er byrjunarstøðan sera avgerandi, og júst byrjunarstøðan hevur verið eitt tað veikasta liðið hjá Ferrari í ár.

Michael Schumacher, sum er 34 stig aftan fyri Fernando Alonso í kappingini um meistaraheitið, sigur, at hetta er ein avbjóðing, og at hann ongantíð hevði droymt um at givið upp.